# Á STILLU NÁTT          **Lurta**

Orð: Knút Wang   lag: Ó. J. Hansen

```
   G                 D7       G
Á stillu nátt, á dreymagátt –
      C       C#m  C    G
tá leiti  eg    til  tín,
       C           C#m     Cm        G
og brosið  títt  í  hjarta  mítt
                    D7     G
ber ljós og hita inn
```

Mær eru nær tá varrar tvær
sum leska sál og sinn´,
Og brosið títt í hjarta mítt
ber ljós og gleði inn.

Men náttin fer tað aftur ber
úr dreymaverð hjá mær
Og vakni eg – tú fer tín veg
og ert ei longur nær

Um meg ei tú vilt elska nú
sum tá vit kendust gott –
Eg hitti teg á mínum veg
- í dreymaverð á nátt!